# Oljukortið yvir Atlantsmótið

Í sambandi við oljuráðstevnuna, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum mikudagin, hevur Sosialurin í samstarvi við Statoil gjørt eitt nýtt aktuelt kort yvir Atlantsmótið tvs. økið eystan fyri Føroyar og vestan fyri Hetland við tilknýti til tað leitivirksemi, sum hevur verið og verður. Vanliga vísa slík oljukort bara tann eina partin av Atlantsmótinum. Her er so gjørd ein roynd at vísa alt økið millum Føroyar og Hetland sum eina heild. Á kortinum síggja vit tey feltini, sum framleiða olju og tey, sum verða bygd út til framleiðslu. Har er yvirlit yvir brunnarnar, sum eru boraðir í økinum, og har verður víst á, hvørjir brunnar verða boraðir næstu árini, umframt at tað greitt framgongur, hvørji feløg standa fyri ymisku loyvunum, báðumegin miðlinjumarkið. Tað hevur víst seg at vera stórur áhugi fyri kortinum og í hesum sambandi bjóðar Sosialurin lesarunum eitt printað kort í góðum pappíri fyri 150 kr. Ringið til blaðið á telefon 311820, spyrjið eftir Duritu og bíleggið kortið ella tit senda okkum ein teldupost, durita@sosialurin.fo

